# Fyrsta norðurlendska ferðsluvirðislønin latin

**Fríggjadagin varð fyri fyrstu ferð latin ein norðurlendsk ferðsluvirðisløn. Hetta hendi í sambandi við fimmtiára hátíðarhaldið hjá Norðurlendska Ferðslutrygdarráðnum (NTR)**

FERÐSLUTRYGD

*Rúna Sivertsen*

Tað var Claes Tingvall, professari, sum fekk heiðurin at fáa fyrstu stóru ferðsluvirðislønina upp á 5000 evrur frá Norðurlendska Ferðslutrygdarráðnum.

Hann fekk virðislønina fyri sítt slóðbrótandi arbeiði fyri ferðslutrygd. Tingvall er nevniliga verkfrøðingurin aftan fyri Nullhugsjónina.

Í ferðslutrygdarhøpi ganga norðurlond undan, samanborið við onnur lond.

- Framyvir fara vit at lata hesa virðislønina hvørt ár. Hon verður latin fyri at eggja nýskaparar um, granskararum, undirvísararum, politikararum og teimum, ið taka avgerðirnar ella einstaklingum til at stríðast enn meira fyri at styrkja okkara støðu, sum heimsleiðandi í ferðslutrygd.

- Claes Tingvall hevur í stóran mun verið við til at styrkt hesa støðu, og tað kann sigast, at Nullhugsjónin eru vorðin ein útflutningsvøra, sum eisini nevndin í EU tekur við í síni virkisætlan fyri ferðslutrygdini, sigur Matti Järvinen, formaður í NTR.

Nullhugsjónin bleiv viðtikin í Svøríki í 1997, í Noregi í 2001 og í Føroyum í 2006.

Norðurlendska Ferðslutrygdarráðið er paraply felagsskapurin hjá Nationalföreningen för trafiksäkerhetens främjande, Svøríki, Rådet for Større Færdselssikkerhed, Danmark, Trafikskyddet, Finland, Trygg Trafikk, Noregi, Umferðarstofa í Íslandi og Ráðnum fyri Ferðslutrygd í Føroyum.

*Kelda: www.ntf.se*



*Claes Tingvall, professari úr Svøríki, fekk ferðsluvirðislønina fyri sítt slóðbrótandi arbeiði fyri ferðslutrygd. Tingvall er verkfrøðingurin aftan fyri Nullhugsjónina*



*F.v. Matti Järvinen, formaður í NTR, Claes Tingvall, professari og René la Cour Sell, stjóri í danska RFSF. Claes Tingvall fekk ferðsluvirðislønina fyri sítt slóðbrótandi arbeiði fyri ferðslutrygd. Tingvall er verkfrøðingurin aftan fyri Nullhugsjónina*




NÝFLETT HETLENDSKT LAMB

1 ára gomul. Vekt um 25–35 kg.
Skorið í helvt klárt at hongja upp.
Fyri kg.

45,-

**Bílegging**

Navn:

Adressa:

Tlf:

| | | |
|---|---|---|
| Miklagarður | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |
| Bónus Glyvrar | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |
| Bónus Klaksvík | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |
| Bónus Tvøroyri | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |
| Bónus Miðvágur | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |
| Brotið Runavík | ○ 10. okt. | ○ 17. okt. |

**Send lepan til**

Miklagarð - Jørgen, Postboks 1059, 110 Tórshavn

MIKLAGARÐUR


# Miðvíst samskifti fyri fyrstu ferð

**IssueConsult er fyrsta og einasta fyritøka í Føroyum, sum burturav ger einstaklingar, fyritøkur og stovnar dugnaligari at samskifta miðvíst. Fyritøkan fæst m.a. við "strategiska kommunikatión" og er nýbrot í samskiftisbransjuni. Ein høvuðstáttur eru fjølmiðla- og samskiftisskeið**

SAMSKIFTI

Nýggjasta fyritøkan í Føroyum eitur IssueConsult, og talan er um ein øðrvísi samskiftisfyritøku, ið hevur miðvíst samskifti í sínum skjaldramerki. Hetta verður á útlendskum nevnt "strategisk kommunikatión".

"IssueConsult tekur undir við setninginum um, at fólk og fyritøkur kunnu ikki ikki-samskifta. Vit samskifta øll alla tíðina í øllum lívsins støðum. IssueConsult hjálpir tær at gerast tilvitaður um hetta og at brúka samskiftisamboð miðvíst í munnligum og skrivligum samskifti".

Hetta siga menninir aftan fyri IssueConsult, Kári Durhuus og Per Højgaard, ið eru útbúnir journalistar við drúgvum royndum innan fjølmiðlar og samskifti. Teir hava starvast inn flestu sløg av fjølmiðlum og hava ráðgivið og undirvíst bæði í Føroyum og uttanlands.

## Skeið og ráðgeving

Virksemið hjá IssueConsult er á tveimum høvuðsøkjum: Skeiðvirksemi og ráðgeving.

"Vit vilja flyta mørkini hjá skeiðluttakarunum. Á einum skeiði hjá IssueConsult skalt tú helst royna tað, sum tú ikki tordi ella dugdi frammanundan. Týdningarmest er, at tú ert opin fyri at royna teg á ein nýggjan hátt" siga Kári Durhuus og Per Højgaard.

IssueConsult hevur sera góðar førleikar á samskiftisøkinum - bæði tá tað snýr seg um samskifti á vanligum starvsfólkastigi og um strategiskt samskifti, ið er eitt leiðsluamboð. Harumframt er fyritøkan sera væl fyri at veita einstaklingum persónliga samskiftiscoaching. Fjølmiðlar og journalistikkur er ein onnur stór styrki.

Í fyrsta umfari eru hesi skeið við í skeiðskránni hjá IssueConsult: "Samskifti fyri øll", "Netsamskifti", "Hin góða framløgan" og "Interview-venjing fyri leiðarar".

Á ráðgevingarøkinum kann IssueConsult loysa allar vanligar uppgávur, men sum tann einasta fyritøkan í landinum bjóðar IssueConsult sær eisini til at seta í verk samskiftistilgongdir í fyritøkum ella stovnum. Har kunnu starvsfólk og leiðsla við workshops og skeiðum búgva seg til at luttaka í tí miðvísa samskiftinum innanhýsis og við kundar og brúkarar úti í samfelagnum og á marknaðinum.

"Stovnurin, sum dugir væl at samskifta við starvsfólk og borgarar, upplivir nøgdsemi. Og fyritøkan, ið samskiftir munagott við verandi og komandi kundar, upplivir framgongd á marknaðinum", vísa menninir aftan fyri IssueConsult á.

## Melda til á heimasíðuni

Á nýggju heimasíðuni www.issueconsult.fo ber til at lesa um virksemið og skeið hjá IssueConsult. Har ber eisini til at melda seg til ymsu skeiðini hjá nýggju, føroysku samskiftisfyritøkuni.

Viðmerkingar til upplýsingar í hesum tíðindaskrivi fáast frá Per Højgaard, tel. 548542, ella Kára Durhuus, tel. 215977.